# Gamlar myndir úr Vágum

*3. partur*

**Hesar myndir eru úr savninum hjá Karl Joensen og Valborg Svaðabúð í Miðvági. Fólk eru vælkomin at gera viðmerkingar til myndirnar, kontaktpersónur er Georg Hansen, hann hittist á telefon 333066**



*A 10: Jógvan og Heini Joensen + ókend føra torv*



*A 11: Elspa Joh. Joensen, Bergljót Heinesen og Nicolina Joensen*



*A 12: Jóhan K. Joensen*



*A 15: Børn hjá gamla Frants Restorff*



*A 16: Guðrun (Guggan) Marjun? og Jóan Heini Joensen í Bø*



*A 14: Martin Johansen á Tormansbakka, Tormans-Martin*



Tvørrandi barnaansing:

# Varaborgmeistari gevur landstýrinum skylduna

FORSORGARLÓG

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Her er grivið út fyri nýggjasta barnagarðinum í Tórahavnar Kommunu. Hann liggur við Løgmannabreyt.*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Í fjør vóru 8,2 milliónir útgoldnar 276 persónum, sum vóru komin undir forsorgarlógina, tí at kommunan ikki kundu bjóða børnum teirra ansingarpláss. Talan var í flestu førum um fólk, sum móti teirra vilja noyddust at siga starv frá sær, tí at onki ansingarpláss var til børnini. Av hesum 276 fólkunum vóru tey allarflestu úr Tórshavnar Kommunu.

Ti ætlaðu vit at seta Jan Christiansen, borgarstjóra, tí manni sum hevur evstu ábyrgd fyri at børnini hjá borgarum í Tórshavnar Kommunu verða ansaði í arbeiðstíðini spurningin, um tað ikki er eitt sindur snópisligt fyri fíggjarliga sterkastu kommununa í landinum, at landskassin má rinda fyri eina uppgávu, sum kommunan ikki megnar at loysa. Men Jan Christiansen er í summarfrí og tí máttu vit lata okkum lynda at tosa við varaborgarstjóran Heðin Mortensen.

-Vit hava eitt íløguloft at halda okkum til. Hetta íløguloft fyri allar kommunur er ásett av landsstýrinum. Við íløguloftinum tekur tað sína tíð at loysa barnaansingartrupulleikan. Vit kundu loyst barnaansingartrupulleikan beinanvegin, um íløguloftið varð tikið burtur, tá tað snýr sum um byggjan av stovnum til barnaansing, sigur Heðin Mortensen.



*Heðin Mortensen, varaborgarstjóri*

-Vit byggja í løtuni tveir nýggjar barnaansingarstovnar fyri 10 milliónir hvønn. ein á Argjum og ein á endanum á Løgmannabreyt í Hoyvíkshaganum. Vit skulu byggja tveir aftur at í komandi ári. Tað vil siga, at vit fáa tvær ferðir 120 børn inn í nýggjar ansingarstovnar. Vit fara at umbyggja eini hús á Argjum og har fáa vit 50 pláss. Vit hava eisini leigað og keypt fleiri hús í seinastuni og vit hava søkt í bløðunum eftir egnaður húsum til ansingarstovnar, men hetta er ikki bara sum at siga tað. Krøvini til ein stovn sum landsmyndugleikarnir seta eru rættuliga strong, sigur Heðin Mortensen, varaborgarstjóri.

-Vit hava keypt hús í Kollafirði og í Kalbak og vit brúka knappar 100 milliónir um árið til barnaansing, so tað er ikki rætt at siga, at vit ikki royna at loysa trupulleikan, sigur hann

### Stór tilflyting

-Um vøksturin í fólkatalinum var normalur í Havnini, so høvdu vit fyri langari tíð síðan havt loyst barnaansingartrupulleikan, men tilflytingin til Havnar av borgarum er so stór í løtuni, at vit klára ikki at halda tørn, fyri at siga akkurát sum er, sigur Heðin Mortensen.

Er tað ein ynskilig støða hjá kommununi, at tilflytingin er so stór?

-Bæði og. Vit hava einki í móti, at fólk flyta til Havnar. Tað vísir seg eisini, at tað eru ung fólk, sum flyta til Havnar, ung fólk sum hava góða útbúgving og arbeiði tá tey koma. Um tað er tað man vil í landinu, at so nógv fólk skulu búgva í Havn, so taka vit í móti nýggju borgarunum og teimum avbjóðingum sum standast av hesum. Vit vísa ongum aftur, sigur hann.

-Trupulleikin við barnaansingini er komin knappliga. Tá kreppan var, tá høvdu vit slett ongan trupulleika við barnaansing. Hetta byrjaði fyri nøkrum fáum árum síðan, at trýstið er so stórt sum nú, og vit brúka øgiligar upphæddir fyri at loysa trupulleikan, sigur hann

### Fríplássini ein trupulleiki

-Tórshavnar Kommuna skal syrgja fyri at fríplássini eru til taks, men Almannastovan ávísir tey. Vit ráa slett ikki yvir hvør fær hesi fríplássini, hóast vit skattamæssiga síggja, at tingini ikki eru í lagi. Her er ein stórur feilur sum liggur í systeminum, og sum vit vilja hava gjørt nakað við. Vit eru nærri borgaranum enn Almannastovan, men tað tykist myndugleikin ikki at skilja. Hetta mál skal takast upp. Semja er um at vit hava brúk fyri fríplássum, men tað eru eisini nøkur sum koma ígjøgnum óneyðugt, sigur Heðin Mortensen.

# Hoydal: Íløguloftið ongin trupulleiki

BARNAANSING

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Høgni Hoydal, landstýrismaður í kommunumálum*

Høgni Hoydal, landstýrismaður, er tann sum hevur ábyrgdina av íløguloftinum hjá kommununum og sum er forðingin fyri at Tórshavnar Kommuna fær loyst ansingartrupulleikan, sambært varaborgarstjóranum Heðin Mortensen. Vit hittu hann beint áðrenn hann fór í flogfarið á veg til fundar á Álandi mikumorgunin. Høgni Hoydal hevur kommunumál um hendi í landsstýrinum.

-Tað er ikki heilt rætt sum Heðin Mortensen sigur. Íløguloftið snýr seg um nakað heilt annað. Tað snýr seg um, at vit ikki aftur invisterað okkum út á sjógv í Føroyum. Iløguloftið er ein avtala millum landstýrið, Føroya Kommunufelag, vegna tær smærru kommunurnar, og Kommunusamskipan Føroya, har Tórshavnar Kommuna er við. Tórshavnar Kommuna hevur góðtikið íløguloftið, her er als ikki talan um eitt diktat frá landsstýrinum. Tað er heldur ongin lóg sum ger íløguloftið. Her er bara talan um eina avtalu millum partarnar, sigur Høgni Hoydal.

-Men tað eru møguleikar innan íløguloftið. Nýtir ein kommuna ikki sítt íløguloft, so kann ein onnur nýta tað. Tað ber eisini til at vekta íløgurnar í eini kommunu. Fyri at loysa ansingartrupulleikan, so kann eitt nú Tórshavnar Kommuna gera av at gera færri íløgur í havnaútbygging og harvið leysgeva pengi til ansingarpláss. Um Tórshavnar Kommuna sigur, at vit taka barnaansingina fram um annað í kommununi, so kunnu teir eisini gera tað, sigur Høgni Hoydal.

-Tað er skeivt av Tórshavnar Kommunu at blaka ansingartrupulleikan yvir til landsmyndugleikan. Kommunurnar fingu ábyrgdina fyri økinum fyri tveimum árum síðan. Íløguloftið er ein avtala, sum allar kommunur hava góðtikið gjøgnum sítt felag, sigur hann.

### Leingja barsilsskipanina

Høgni Hoydal sigur, at einasta landsins myndugleikar kunnu gera fyri at loysa verandi ansingartrupulleika er at leingja barsilsskipanina. Landstýrið arbeiðir við hesum máli.

-At leingja barsilsskipanina var við í samgongugrundarlagnum og allir flokkar førdu fram undan valinum, at teir taka undir við at gera hetta. Tí kunnu vit rokna við, at barsilsskipanin verður longd í næstum. Men meðan vit bíða eftir hesum kunnu kommunurnar leggja seg meira eftir at vekta sínar íløgur, soleiðis at ansingartrupulleikin verður loystur, sigur Høgni Hoydal.

-Tann sosiali sektorurin, her hugsi eg um íbúðir og annað er ein tann størsti trupulleikin í Føroyum í dag, og hetta er serliga galdandi í høvðsstaðarøkinum. Her má eitt nú Tórshavnar Kommuna prioriterað eftir tí. Tað í hvussu er ikki íløguloftið, sum hevur verið til hindurs fyri, at barnaansingartrupulleikin ikki er loystur, sigur Høgni Hoydal.